# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*– Okkara spæla var á hægri støði enn tað hjá Týsklandi. Vit spældu sum heild betur.*

*Marcello Lippi, italskur landsliðsvenjari í fótbólti, eftir hálvfinaluna týskvøldið.*

# Tárini trilla í Týsklandi

**Italia gjørdi bart, tá ið tað vóru spældir 119 minuttir av HM-hálvfinaluni ímóti Týsklandi í gjárkvøldið. Eftir sita vónbrotnir vertir, ið ætlaðu sær at spæla HM-finalu sunnudagin**

HM

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Týskland hevur staðið seg væl í HM-endaspælinum á heimavøllin seinastu vikurnar. Liðið hevur spælt álopssinnað, hevur gjørt nógv mál og er komið langt í kappingini.

Men í gjárkvøldið brast tann stóri dreymurin um at spæla eina HM-finalu á heimavølli.

Týskland spæli hálvfinalu ímóti Italia, og tann tætti – og í longum løtum keðiligi – dysturin var ikki avgjørdur fyrr enn tað restaðu tveir minuttir av umdystinum.

Einki mál kom í vanligu leiktíðini, og í umdystinum hevði Italia tvey skot á stongina, men inn vildi bólturin ikki.

Tá ið 119 minuttir vóru spældir, og øll vóru farin at fyrireika seg til brotssparksskapping, sló Italia til. Fyrst smekkaði bakkurin Grosso til eftir hornaspark, og so var Alessandro Del Piero ísakaldur, tá ið hann varð spældur leysur. 2-0 til Italia eftir lítlari løtu, og so var Italia í finaluni og Týskland úti av kappingini.



*Týski landsliðsspælarin David Odonkor var sera vónbrotin eftir tapið ímóti Italia, og tað hjálpti lítið, at týski landsliðsvenjarin royndi at ugga sínar spælarar*
*Mynd: Scanpix*

### Errin av sínum spælarum

Týski landsliðsvenjarin Jurgen Klinsmann royndi eftir tapið at troysta sínar vónbrotnu spælarar, men bæði teir og áskoðararnir lótu tár falla.

– Vit eru sera vónbrotnir av tapinum, men vit kunnu ynskja liðnum tillukku við einari flottari kapping. Vit hava eitt ungt lið, og spælararnir vístu ein ótrúligan vilja og moral. Teir gjørdi tjóðina stolta, sigur Jurgen Klinsmann.

Nú verður nógv tosað um, hvørt Klinsmann fer at halda fram sum landsliðsvenjari hjá Týsklandi. Eftir misjavnar fyrireikingar til endaspælið, hevur Týskland staðið seg sera væl í endaspælinum.

– Eg vóni, at Klinsmann heldur fram í starvinum. Hann hevur eitt ungt lið, sum hann hevur skipað eftir sínum høvdi. Ungu spælararnir líta á hann, og tað hevði verið stórt spell, um vit missa hann, sigur Franz Beckenbauer, sum hevur eitt orð at siga í týskum fótbólti.

### Rætta liðið vann

Italiumenn vóru í sjeynda himli eftir sigurin á Týsklandi í gjárkvøldið, og tað var uppiborið, at Italia vann dystin, tí liðið átti munin í tætta dystinum.

– Tað er fantastiskt at verða við í einum slíkum dysti. At vinna á Týsklandi í teirra egna húsi – ja, eg kann ikki seta orð á tað, segði Alessandro Del Piero, sum gjørdi annað málið hjá italumonnum.

– Eg havi fingið nógvar krittikk seinastu tíðina, men eg haldi, at eg í dag vísti, at eg vil líka so gjarna vinna HM sum allir hinir spælararnir.

Landsliðvenjarin hjá Italia helt eftir dystin, at rætti vinnarin var funnin.

– Hetta er ein dreymur, sum gongur út, og tað hevur verið leingi at bíða. Um nakar hevði uppiborið at vinna hendan dystin, so vóru tað vit. Vit høvdu takið, og hóast vit vóru troyttir móti endanum, tordu vit at satsa fyri at vinna, segði Marcello Lippi.

## Fleiri dystir fluttir

Kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur flutt fleiri dystir í Formuladeildini næstu tíðina.

Dysturin millum B36 og NSÍ, sum skuldi spælast sunnudagin, er fluttur heilt til 23. august. B36 hevði ynskt at spæla dystin hesa vikuna, men FSF hevur flutt dystin til eftir summarsteðgin. Orsøkin er, at B36 í næstu viku skal spæla Europa Cup á Malta, og liðið fer longu avstað um vikuskiftið.

Týðandi botndysturin millum B68 og ÍF, sum skuldi spælast mánakvøldið er eftir ynski frá feløgunum framskundaður til sunnudagin.

Harafturat er dysturin millum EB/Streym og ÍF, sum skuldi spælast sunnudagin 16. juli, framskundaður til mikudagin 13. juli.

Seinasta umfar í Formuladeildini fyri summarsteðgin er sunnudagin 16. juli.

**ek**

## LÍF eisini online

Leirvíkingar hava staðið seg væl í næstbestu fótbóltsdeildini í ár, og liðið er við í stríðnum um uppflyting til Formuladeildina.

Nú bjóðar felagið seg eisini fram á internetinum, har nógv av føroysku feløgunum hava havt heimasíðu í fleiri ár.

LÍF hevur nú eisini fingið heimasíðu, har tað ber til at fylgja við í tí, sum hendir í felagnum. Á heimasíðuni ber til at lesa um dystirnar hjá besta mansliðnum, upplýsingar eru um ábyrgdarfólk í felagnum, venjingartíðir og annað. Eisini ber til at síggja myndir.

Heimasíðan hjá LÍF er at finna á adressuni www.lif.fo

# FSF veitir feløgunum stuðul til umsiting

**Fótbóltssambandið hevur nú latið fótbóltsfeløgunum umsóknarblað, har tey kunnu søkja um stuðul til umsiting. Formulafeløgini kunnu fáa upp í 45.000 krónur í stuðli**

UMSITING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fótbóltssamband Føroya hevur nú givið sínum limafeløgum boð um, at tey kunnu søkja um stuðul úr grunninum MAFF (Menning av fótbóltsfeløgum).

Stuðulin verður latin til skrivstovuhald úti í feløgunum, og ætlanin er, at stuðulin skal latast sum beinleiðis løn til tann, ið hevur skrivstovuna um hendi.

Harafturat kunnu feløgini eisini søkja um stuðul til skrivstovuútbúnað.

FSF hevur gjørt av, at Formulafeløgini kunnu fáa góðar 45.000 krónur í stuðli, liðini í 1.deild góðar 30.000 krónur, og hini feløgini góðar 15.000 krónur.

Afturfyri krevur FSF, at feløgini hava skrivstovu opna í minsta lagi frá kl. 14.00 til 16.00 hvønn gerandisdag, og at skrivstovufólkið tekur sær av samskiftinum við FSF og hini feløgini, umsiting av spælaraloyvum, dystarskrá, dystarboðum og ymiskari skráseting.

Føroysku feløgini hava í eina tíð eftirlýst stuðul frá FSF í sambandi øktu krøvini til umsiting og skrivstovuhald, og nú er grunnurin, ið skal stuðla feløgunum við hesum, veruleiki. Nú er tað upp til feløgini at seta skrivstovufólk og søkja um stuðul.